


*Ein løgin snigil stingur høvdið út: »Er det en af jer, der skal være min kone?« spyrð hann og flennur. Legg merki til skeltini á húsinum og á bønum*

MYNDIR: RIGMOR DAM

# BAKSÍÐAN Á CHRISTIANIA





EIN KALDAN OG FRIÐARLIGA SUNNUDAG HERFYRI SPÁKAÐU VIT Á SOSIALINUM OKKUM EIN TÚR Í HEYSTSKRÍDDA BÝLINGINUM **CHRISTIANIA** Í KEYPAMANNAHAVN. KREATIVU SÁLIRNAR Í **FRÍSTAÐNUM** VÍSA OKKUM, AT BÚSTAÐARUMHVØRVI KANN VERA ANNAÐ ENN TRIMMAÐIR RUNNAR, NÝMÁLAÐIR CARPORTS OG POLERAÐIR BROTAFLISAR.



**CHRISTIANIA**
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Vanliga vísa miðlarnir einvísu myndina av 38 ára gamla býlinginum við hashi, løgreglu, rockarum og harðskapi. Men, myndin hevur eisini eina aðra síðu, tí Christiania er eisini eitt vakurt og friðarligt stað við hugnaligum húsum og vakrari náttúru, har tað búgva eini 1000 fólk í øllum aldursbólkum – og har er alt frá bumsum til akademikarar.

Tá vit koma heilt inn í Christiania, har fólkini búgva, er umhvørvið fremmant og ævintýrakent, sum at vera lend onkrastaðni millum anarki og kærleika – rustiskt, rustreytt og rokaligt.

Her eru eldri umvæld hús, arkitektoniskar perlur og fleiri sonn Fedtmulehús. Allastaðni er prýtt við urtapottum, plantum, standmyndum og listarverkum. Nógv byggirok, súkklur og spælandi børn. Longri úti móti veruleikanum eru handlar, verkstøð, caféir og framúr góðar matstovur. Og heilt úti við inngongina finna vit meira rokaliga og ótrygga umhvørvið við løgnum typum, stórum hundum og sølu av bæði einum og øðrum.



*Sjarmerandi plantusetingar eru allastaðni*

## Livandi utopia

Christiania, sum eisini verður rópt Fristaden Christiania ella Staden, er eitt stórt øki við Volden í býarpartinum Christianshavn í Keypmannahavn. Økið verður stýrt sum eitt sjálvstýrandi kollektiv, har hægsti myndugleiki er felagsfundurin. Í dag er hesin serstaki býlingurin næststørsta ferðamannamálið í Keypmannahavn, og vanligir borgarar brúka eisini staðin til útferðarmál og gongutúrar við børnum og hundum.

Tað var í 1971, at ein bólkur av íbúgvum á Christianshavn, og seinni eisini flipparum og øðrum ungdómum á vinstravonginum, hertóku gamla herðnaðarøkið, sum hevði staðið avbyrgt í fleiri áratíggju. Hesi skjótt 40 árini hava íbúgvarnir bygt upp eitt lítið bilfrítt samfelag við egnum gjaldoyra, fyritøkum, bústøðum, barnahúsum, ruskskipan, handlum, matstovum, mentanartilboðum, verkstøðum og øðrum, sum hoyrir til eitt samfelag.

Myturnar eru mangar um Christiania. Til dømis at tey onki rinda fyri el og vatn. Nógvar av hesum mytum verða gjørdar til skammar inni á heimasíðuni hjá staðnum www.christiania.org.

Í endamálinum fyri Christiania, sum varð felt niður á pappír hin 13. november 1971, og sum framvegis er galdandi, stendur, at: endmálið er at byggja upp eitt sjálvstýrandi samfelag, har hin einstaki kann liva í frælsi, men við ábyrgd fyri felaggskapinum. Samfelagið skal búskaparliga hvíla í sær sjálvum, og við felags lógvatakið skulu íbúgvarnir til eina og hvørja tíð prógva, at fysisk og psykisk dálking er óneyðug.

Síðan eri aðrar reglur skoyttar uppí, eitt nú forboð móti hørðum rúsevnum, ryggmerkjum, vápnum, harðskapi umframt keyp og sølu av bygningum og bústøðum.

## Liggur á deyðastrá

Sum sagt kenna vit kanska best Christiania frá fríu hashsøluni, sum hevur eyðkent staðin líka frá byrjan. Men síðan 2004 hevur fría sølan verið avmarkað, bæði vegna trýst frá íbúgvunum og frá løgregluni. Samskiftið og samstarvið við myndugleikarnar er sera spent í løtuni og danska stjørnin roynir av øllum alvi at fáa frístaðin burtur, so økið kann virka undir vanligum borgarligum treytum, eins og restin av samfelagnum. Enn hevur tað ikki eydnast, einamest tí stuðulin til staðin er so stórur millum vanlig fólk í Keypmannahavn. Men mangt bendir á, at dagarnir hjá Christiania eru taldir.

Ofta er baksíðan á Christiania á forsíðuni. Men hin baksíðan, sum myndirnar her vísa, hevði kanska betri uppiborið at koma á forsíðuna.



*Onkur er farin undir at gera mosaikborð – sá ikki so ringt út*